TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Miðfyristingin

Í miðfyrisitingini eru hesar deildir:

Roknskapardeildin, herundir bókhald, kassi og líkningareftirlit
Snarskiva
KT-deild
Starvsfólka- og lønardeild
Skattakærufyrisiting

Miðfyrisitingarstjórin fer at starvast í ráðhúsinum har m.a. borgarstjórin og kommunustjórin húsast.

Tøkniliga er kommunan frammarlaga og hevur netsamband við flestu deildir og stovnar. Hetta stuðlar undir málunum hjá kommununi um støðugt at effektivisera og miðspjaða uppgávurnar umframt at betra um stýringina og tænastustøðið.

Í miðfyrisitingini starvast í løtuni 45 fólk, í ymiskum hølum í miðbýnum. Á lønarlistanum eru yvir 1.200 fólk, lønt eftir 17 sáttmálum.

Á www.torshavn.fo fært tú meira at vita um kommununa og starvið.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Miðfyrisitingarstjóri

Tórshavnar kommuna hevur avgjørt at seta stjóra fyri miðfyrisitingina skjótast til ber.

Stjórin er ovasti leiðari fyri miðfyrisitingini við tilvísing til kommunustjóran og borgarstjóran.

Miðfyrisitingarstjórin verður limur í leiðslubólkinum hjá kommununi. Í honum eru nú borgarstjórin, kommunustjórin, býararkitekturin, býarverkfrøðingurin og trivnaðarstjórin. Miðfyristingarstjórin verður við til at raðfesta uppgávurnar og leggja framtíðar ætlanir hjá kommununi.

**Arbeiðsuppgávur:**
Høvuðsuppgávan verður at stjórna teimum økjum, ið hoyra til miðfyrisitingina, og hava ábyrgdina av fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu stýringini innan hesi øki.

Ein tann fyrsta uppgávan hjá miðfyrisitingarstjóranum verður at skipa serstaka starvsfólka- og sáttmáladeild og standa fyri at gera uppskot til starvsfólkapolitikk.

Miðfyrisitingarstjórin skal samskipa og raðfesta uppgávurnar á økinum og tryggja, at mest møgulig nytta fæst úr tilfeingi kommununnar, t.d. við at menna fyrisitingina sum heild og einstaka starvsfólkið. Stjórin skal eisini tryggja, at umsitingin hevur eitt gott samskifti við borgarar, viðskiftafólk og landsstovnar.

Miðfyrisitingarstjórin er ráðgevi innan tey øki, sum hoyra til miðfyrisitingina. Hon/hann skal ansa eftir, at lógir, reglugerðir og samtyktir á økinum verða fylgdar.

**Býráðið roknar við, at umsøkjari**
- hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- gongur á odda, er sjónligur, opin og motiverandi
- dugir væl at fyrisita og samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur leiðsluroyndir, er málsøkjandi og tekur undir við einum nýmótans leiðslustíli
- er positivur og til reiðar at taka avgerðir
- hevur virðing, fatan fyri og vil samstarva við ta politisku skipanina
- dugir væl at málbera seg á føroyskum bæði í skrift og talu

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv lønt í 38. lønarflokki (treytað av góðkenning fíggjarmálaráðharrans) við tvey ára royndartíð.

Meira fæst at vita um starvið hjá Jens Mariusi Poulsen, kommunustjóra, ella Heðini Mortensen, borgarstjóra, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. mai 2005.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

zarepta 2005

## Tekningarseðil til familjulegurnar.

Um Gud vil, er ætlanin aftur í ár at hava familjulegur í Zarepta í Vatnsoyrum.

Av tí at pláss bert er fyri 25 familjum á hvørji legu, er møguleikin at hava tvey ynski á tekningarseðilinum.

Eru ivaspurningar, ber til at ringja á tlf. 28 21 40

Fyllið seðilin út sum skjótast, og tit frætta aftur í góðari tíð.

***Tekningarseðilin skal sendast til:***
**Ragnfríð Kannuberg, Tjaldravegur 1, Postboks 201, 620 Runavík**

| | Familjulegur 2005 | Ynski 1 | Ynski2 |
|---|---|---|---|
| Familjulega I | ley. 28.05 - frí. 03.06 | | |
| Familjulega II | ley. 04.06 - frí. 10.06 | | |
| Familjulega III | ley. 11.06 - frí. 17.06 | | |
| Familjulega IV | ley. 18.06 - frí. 24.06 | | |
| Familjulega V | mán. 16.08 - frí. 21.08 | | |
| Familjulega VI (*Fyri familjur við børnum við breki*) | mik. 24.04 - sun. 28.08 | | |

Navn foreldur:

Navn og aldur á børnum:

Tlf.: Gøta: Bygd/býur:

Viðmerkingar:

# KOYRISKÚLIN Í MIÐBÝNUM

Nýtt teoriskeið til persónbil byrjar mánadagin 25. apríl 2005 kl. 17.00

Avgreiðir øll koyrikort

**NIELS P. OLSEN**
TEL 31 00 10 · FARTEL 22 30 41

**BJARKI JOHANNESEN**
TEL 31 48 45 · FARTEL 21 48 45

**ÓLAVUR ARGE**
TEL 31 40 02 · FARTEL 21 40 02

**MARNAR ANDREASEN**
TEL 31 43 81 · FARTEL 21 43 81

Sosialurin 341800

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!